# Einki lyfti til Shevchenko

Ukrainski álopsspælarin Andrej Shevchenko hevur verið skaddur í summar, men hóast hann nú er til reiðar at spæla fyri Chelsea aftur, fær hann einki lyfti um pláss á liðnum. Kappingin um álopsplássini er hørð við spælarum sum Drogba, Pizarro og Kalou í hópinum, og hjálparvenjarin Steve Clarke sigur, at Shevchenko verður noyddur at bíða eftir sínum kjansi, og so taka kjansin, tá ið hann fær hann.



# Arsenal keypir Chelsea-spælara

Enska felagið Arsenal hevur keypt ein spælara frá kappingarneytanum Chelsea. Tað er franski spælarin Lassana Diarra, sum flytir úr Chelsea til Arsenal at spæla. Arsenal og Chelsea hava áður selt hvørjum øðrum spælarar, og í fjør var tað nógv umtalað, at Ashley Cole fór til Chelsea, og William Gallas fór til Arsenal. Diarra kann spæla høgri bakkur ella á miðvøllinum.

EB/Streymur-Skála 2-0 (1-0):

# Greiddu skyldina



*Fyri tað nógva hevði EB/Streymur tamarhald á støðuni, tá Skála vitjaði sunnudagin. Og við 2-0 sigrinum hildu teir fast í bæði HB og trýstinum, sum gullbiðlarnir frá í fjør nú eru við at leggja á oddaliðini*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**Talan var sjáldan um stórvegis spenning á Streymnesi, har EB/ Streymur vann ein fult uppibornan sigur**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

*EB/S*

*Skála*

Eftir vónbrotið í fjør ganga fólk kring Sundalagið nú og droyma um at gera øvugta kynstrið. Altso at EB/Streymur hesa ferð skal liggja í bakhjólinum fyri síðani at yvirhála fremstu liðini á sjálvari málstrikuni.

Fortreytirnar eru í øllum førum til staðar, nú EB/ Streymur er seks stig aftan fyri bæði NSÍ og B36. Og við heimadystum til góðar móti báðum oddaliðunum kunnu teir á samansetta liðnum sjálvir syrgja fyri, at talan verður um óvanliga spennandi endaspurt.

Sunnudagin var tað Skála, sum stóð fyri tørni, og her hevði heimaliðið ikki teir heilt stóru trupulleikarnar.

Fyrstu løtuna settu vertirnir seg á tað mesta, og teir skaptu eisini nakrar møguleikar. Hol kom eisini á, tá Hanus Eliasen varð feldur í brotsteiginum. Sorin Anghel tók sær av brotssparkinum, og restina av fyrra hálvleiki royndu teir at trýsta.

Tó at trýstið ikki alla tíðina var eins stórt, so helt leikgongdin sær eisini eftir steðgin. Tað gekk tó hálvur tími av seinna hálvleiki, áðrenn Hans Pauli Samuelsen kundi beina spenningin burtur, tá hann av brotsteigarmarkinum sendi leðrið í netið. Og so vóru eisini betri ráð at flenna, tá Rafal Kwiecinzki fyri opnum máli sendi bóltin á stólpan, heldur enn at rulla í netið.

### Berjast fyri heiðursmerkjum

Sigurin ber fyrst og fremst við sær, at EB/Streymur heldur tørn við HB í dystinum um bronsukrónurnar. Men ein avleiðing av hesi kapprenning er so, at munurin fram til oddin enn eina ferð minkaði.

Hesin er nú seks stig, og um tvær vikur kann EB/ Streymur sjálvt syrgja fyri, at í øllum førum annað av oddaliðunum kemur nærri. Tá kemur NSÍ nevnliga á vitjan, og kann EB/Streymur eisini vinna ta uppgerðina, røkist fyri einum endaspurti, ið kann verða munandi meira spennandi, enn tey flestu mundu gruna fyri bara tveimum vikum síðani.

Hjá Skála tykist árið hinvegin enda í ongamannalandi. Niðurflytingarvandin er sum so rættiliga fjarður, og tað sama má so eisini sigast um heiðursmerkini, sum tey á Skála neyvan droyma um í ár.

## Símun til Noregs

Beint undan evstamarkinum fyri spælaraskifti gjørdi norska Notodden leigusmáttmála við Keflavík. Hesin merkir, at Símun Samuelsen hetta kappingarárið skal spæla í felagnum, sum í løtuni liggur nummar 11 í næst bestu norsku deildini. Trý stig oman fyri niðurflytingarstrikuna.

Sum skilst, so vóru bara fáir minuttir eftir av sonevnda transfer-vindeyganum, tá sáttmáli nendaliga varð góðkendur. Norska fótbóltssambandið góðtekur einki annað enn originalar undirskriftir, og tí mátti Símun við flogfari til Noregs, soleiðis at tað var rætta undirskriftin – og ikki eitt kopi umvegis fax – sum stóð á sáttmálanum. So hjá Símuni og umboðsmanni hansara, Jákup í Stórustovu, var talan um ein heldur ferðmiklan seinnapart.

Á heimasíðu felagsins leggur felagið dent á, at teir hava fylgt Símuni væl.

- Vit fremja einki óðamannaverk við at gera hendan sáttmálan. Símun er ein spælari, sum vit hava fylgt yvir eitt longri tíðarskeið, og eg havi eisini sjálvur sæð hann spælt, sigur Jan Halvor Halvorsen, sum er venjari hjá felagnum.

Umframt Símun Samuelsen hevur Notodden tryggjað sær tveir aðrar spælarar, og tí meta teir, at talan er um styrktan hóp, sum nú skal lyfta liðið burtur úr niðurflytingarvandanum.